

Teir eru seks mans í Octavia: Gert Grandt, sangur og gittar, Peter Jakobsen, gittar og sangur, Matthew Jensen, trummur, Anders Medin, saxofon, Carsten Poulsen, bass og Jan Friis, keyboard.

Spæla móti speed

Hvør skuldi trúð tí, at Heilsumálaráðið og Alkohol- og narkotikaráðið í Danmark lótu pengar til plátuútgávu, og enntá til eina soul-rock plátu?

Men tað hava tey bæði ráðini gjørt. Plátan, ein single, eitur "Til stregen" og orkestrið Octavia. Hitt lagið á plátuni eitur "Jingles". Ribe Amts Ungdomscenter gav út plátuna og orsøkin til stuðulin er tann, at plátan er liður í landsumfatandi herferð móti rúsevninum speed, eitt nú amfetamin, í Danmark.

Føroyingar fáa høvi at hoyra hesi bæði løgini og onnur seinni í juli, tí Octavia kemur til Føroya 19. juli og verður her til tann 26. Far-Con skipar fyri og Octavia skal millum annað spæla í Tiffany.

Octavia byrjaði fyri tveimum árum síðani og hevur amerikanskan soul og rythm'n'blues tónleik sum fyrimynd. Bólkurin hevur givið út tvær singleplátur og fyrsta stóra plátan kemur í september í ár.

útvarpsskráin

Týsdagin 11. juli

09.30 **Markleys breiðist nú fyri tær fold** (e) 15. partur
12.55 **Føroyski skipalistin**
19.00 **Barnaútvarpið**
19.30 **Úr plátusavninum**

Mikudagin 12. juli

09.30 **Barnaútvarpið**
11.01 **Kvøðuljómar til sjófólkið**
19.00 **Miðvikan**
19.30 **Løg mær dámar**

sjónvarpsskráin

Týsdagin 11. juli

19.30 **Pengatrøllið** (ft)
20.00 **Dagur og vika**
20.30 **Baskarar í Santazi**
21.30 **Oyggjaleikirnir**
23.00 **Barnasorg**
23.25 **Liðugt**

Mikudagin 12. juli

19.00 **Oyggjaleikirnir** — Fótboltur: Føroyar—Álandsoyggjarnar
20.45 **Frá oyggjaleikunum**
22.00 **Oyggjaleikirnir enda**
23.15 **Liðugt**

Kyog og Koyr

SJÓNVARP

Týsdagin kl. 23.00:

Barnasorg

Astrid er faðirleys

Astrid var 10 ára gomul. tá ið hon misti pápa sín. Í dag er hon 13 ára gomul. Í hesi sending greiðir Astrid frá, hvussu hon kendi sorgina. Lika skjótt sum tey vaksnu, fataði hon, hvat var hent, men eitt skilti hon ikki, og tað var, hvi so nógv fólk umgingust hana. Hon helt, at okkurt ruggaði ikki rætt við henni, ella kanska ræddust fólkini hana, av tí sum hent var. Nógv skundaðu sær í hvussu so var yvir um vegin, tá hon kom móti teimum. Astrid sigur, at hon heldur børn eru sterkari enn tey vaksnu, men bæði børn og vaksin hava stuðul fyri neyðini, tá ið t.d. ein pápi doyr. Tað, sum Astrid fegin vil hava fram í hesi sending, er at tað er neyðugt at tosa meira um deyðan, og ikki lata hetta vera eitt »tabu-evni«.

V4-tølini

Í drátti nr. 801 tann 10. juli 1989 vórðu hesi tøl drigin: 68 — 12 — 86 — 35 — 25 — 1 — 90 — 75 — 89 — 71 — 79 — 19 — 57 — 66 — 48 — 10.

Vinningur: 45.700 krónur.

Vinnarar Fimm, triggir úr Klaksvík og tveir úr Havn.

Eykavinningur: Ferð til Mallorca fyri tvey í tvær vikur við 5.000 krónum í lummapeningi vann Poulina Olsen, Kongsgil 11, Havn.

Pedagogar

Søkt verður eftir 2 pedagogum at byrja 1. sept. 1989.

Upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til

Barnagarðin á Konmansmýru
Tlf. 1 78 78

Føroya Sparikassi

søknast eftir

UNGUM MANNI

við koyrikorti at byrja 1. august

Starvið umfatar m.a.:

- At røkja tað dagliga sambandið millum deildirnar
- Postflutningur
- At hjálpa til við goymsluarbeiði

Arbeiðstíð og løn:

Arbeiðstíðin verður 37,5 tímar um vikuna og lønin verður eftir sáttmála millum Samráðingarstovn Sparikassana og SFS.

Hevur hetta tin áhuga, ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn, saman við møguligum viðmælum til:

Føroya Sparikassi, Postsmoga 34, 110 Tórshavn

í seinasta lagi friggjadagin 21. juli.

Grafisk Tekniorstova v/ Ingvar I. 4291